BARNAVERKÆTLANIN

EITT TVØRGEIRAÐ SAMSTARV MILLUM LAND OG KOMMUNUR

HOYRINGARSVAR

NLH 20-11-2025

HOYRINGARSVAR

Allir fólkaskúlar umframt útvaldir barnaverndarstovnar, hava fingið tilfar um uppskotið til barnalóg, um endamálið við lógini og um hoyringartilgongdina. Grundað á hetta hava tey arbeitt við uppskotinum og skrivað hoyringarsvar.

Fleiri enn 170 børn hava verið við at skriva hoyringarsvarini. Vit hava móttikið 40 hoyringarsvar, eitt nú frá næmingaráðum, móttøkuflokkum, serflokkum og sertilboðum í 19 skúlum, umframt frá 3 barnaverndarstovnum.

Næmingaráðini hava skipað arbeiðið í sínum skúla – annaðhvørt við at savna næmingar til felags kjak ella við at vitja úti í flokkum. Úr hesum hava tey orðað eitt felags hoyringarsvar, har næmingaráðið hevur umboðað sjónarmiðini hjá næmingunum í skúlanum. Hetta hevur givið næmingunum royndir við fólkaræði, umboðan og luttøku í samfelagsligum avgerðum.

Øll hoyringarsvarini eru síðani savnað og greinað í eini felags greining, sum lýsir høvuðsmynstur og felags sjónarmið í tí, sum børn og ung hava ført fram um barnalógina.

GREININGARHÁTTUR

Hoyringarsvarini frá børnunum eru greinað við eini induktivari, datadrivnari greiningarhátti (Gioia-háttinum).

Hetta merkir, at greiningin tekur støði í tí, sum børnini sjálvi hava sagt, skrivað og víst á, uttan at leggja fastar tulkingar ella hugtøk omanyvir svarini frammanundan.

Í fyrra umfari eru barnanna egnu orð og úttrykk savnað og skipað. Í næsta umfari er leitað eftir felags mynstrum og samanhangum í hesum útsøgnum. Hesi mynstur eru síðani savnað í yvirskipaðar høvuðsdimensionir, sum lýsa, hvat børnini samlað leggja dent á í mun til barnalógina.

Greiningarhátturin tryggjar, at niðurstøðurnar eru beinleiðis grundaðar á røddirnar hjá børnunum sjálvum, og at úrslitini vísa á felags sjónarmið heldur enn einstøk svar.



Útsøgn hjá børnunum

Innlit og samanhangur

Viðmæli

HØVUÐSÚRSLIT

Greiningin av hoyringarsvarunum vísir fimm greið høvuðsúrslit, sum ganga aftur í svarunum frá børnum og ungum kring landið.

Børnini meta, at barnalógin hevur fleiri týðandi styrkir, serliga tá ið talan er um rættindi, trivnað og vernd. Samstundis vísa hoyringarsvarini á øki, har børnini sakna greiðari ásetingar, størri fokus og sterkari praktiska fremjing, fyri at lógin skal virka í verki.

Samanlagt leggja børn og ung serliga dent á hesi fimm øki:

- Rættstundis hjálp – at børn fáa hjálp rættstundis og sleppa undan langari bíðitíð.
- Rødd og verulig ávirkan – at børn verða hoyrd og fáa afturmelding, tá tey siga sína meining.
- Javnbjóðis møguleikar og viðbreknir bólkar – at lógin eisini fevnir um tey tey børn, sum hava størri tørv á stuðli.
- Samstarv og ábyrgd – at vaksnir og stovnar samstarva greitt og taka ábyrgd.
- Barnavinarlig kunning – at rættindi og avgerðir verða miðlað á ein skiljandi hátt.

RÆTTSTUNDIS HJÁLP

Børn og ung meta, at eitt av teimum sterkastu punktunum í lógaruppskotinum er, at tað leggur dent á rættstundis hjálp og á ábyrgdina hjá skúlunum fyri trivnað hjá næmingum.

Lógin verður sædd sum eitt týðandi stig ímóti at tryggja, at børn fáa stuðul, tá ið tey hava tað trupult, og at trivnaður er ein natúrligur partur av skúlans uppgávum.

Samstundis vísa hoyringarsvarini á, at børnini sakna greiðari ásetingar. Serliga seta tey spurning við, hvat “rættstundis hjálp” í verki merkir. Tey eftirspyrja ítøkilig krøv, til dømis tíðarfreistir og greitt svar upp á, nær og hvar børn og ung kunnu venda sær fyri at fáa hjálp.

Eisini verður víst á tørvin á at tryggja ein fastan kontaktpersón í nærumhvørvinum, sum børn kunnu venda sær til, tá ið tørvur er á stuðli.

RØDD OG VERULIG ÁVIRKAN

Børn og ung meta, at tað er ein týðandi styrki í lógaruppskotinum, at rætturin at verða hoyrdur verður staðfestur.

Tey halda, at barnalógin sendir eitt greitt signal um, at børn eiga at hava eina rødd í málum, sum viðvíkja teimum sjálvum. Samstundis vísa hoyringarsvarini á fleiri veikleikar.

Børnini sakna greiðar mannagongdir fyri, hvussu hoyring av børnum í einstøkum málum skal fara fram. Fleiri børn stúra eisini fyri, at yngru børnini ikki eru nóg væl tryggað at verða hoyrd.

Eisini eftirspyrja børnini krøv um afturboðan, so tey vita, hvat verður gjørt við tað, tey hava víst á.

Harumframt verður víst á, at barnaluttøka á politiskum stigi – eitt nú í sambandi við menning, mannagongdir, lógararbeiði og kunngerðir – ikki er nóg greitt ásett í lógaruppskotinum.

JAVNBJÓÐIS MØGULEIKAR

Børn og ung meta, at ein týðandi styrki í lógaruppskotinum er, at tað leggur dent á javnrættindi, og at øll børn skulu hava somu grundliggjandi rættindi, uttan mun til bakgrund og lívsumstøður.

Lógin verður sædd sum ein týdningarmikil karmur fyri at tryggja, at øll børn verða vard og hava atgongd til hjálp.

Samstundis vísa hoyringarsvarini á, at lógaruppskotið í minni mun tekur hædd fyri, at summi børn eru í størri vanda fyri at enda í mistrivnaði. Børnini eftirspyrja málrættaðar og fyribyrgjandi skipanir fyri sárbarar bólkar, eitt nú børn, ið bera brek, við diagnosum ella øðrum serligum tørvi, børn í fátækraváða, børn, hvørs foreldur eru fráskild, børn, sum uppliva happing, og fleirmælt og fleirmentað børn.

Eisini verður víst á, at summi børn kunnu síggja út til at hava tað gott, men kortini kunnu hesi børn stríðast við lágt sjálvsvirði ella aðrar sálarligar avbjóðingar, og børnini ivast í, um tey vera sædd.

SAMSTARV OG ÁBYRGD

Børn og ung meta, at ein greið styrki í lógaruppskotinum er, at tað leggur dent á tvørgeirað samstarv og á ábyrgdina hjá vaksnum, tá fleiri stovnar og fakbólkar eru partar av málinum.

Serliga verður mett positivt, at lógin ásetur, at upplýsingar skulu fylgja barninum, og at netverkssamskipari kann verða settur at samskipa fløkt mál, so barnið ikki dettur niðurímillum skipanir.

Samstundis vísa hoyringarsvarini á, at børnini sakna greiðari ásetingar fyri, nær og hvussu samstarv og netverkssamskipan skulu virka í verki.

Tey seta spurning við, hvussu tørvur verður mettur, hvør tekur stig til samstarv, og hvør hevur endaligu ábyrgdina, tá fleiri aktørar eru partur av málinum.

BARNAVINALIG KUNNING

Børn og ung meta, at ein týðandi styrki í lógaruppskotinum er, at tað viðurkennir rættin hjá børnum til at fáa kunning um viðurskifti, sum viðvíkja teimum sjálvum.

Hetta verður sæð sum ein grundleggjandi fortreyt fyri, at børn kunnu skilja síni rættindi og luttaka á ein meiningsfullan hátt. Samstundis vísa hoyringarsvarini á, at lógaruppskotið manglar greið krøv til, hvussu kunning til børn skal miðlast.

Børnini eftirspyrja, at kunning er barnavinarlig, aldurshóskandi og visuell, og at hon eisini verður tøk á fleiri málum. Uttan slík krøv er vandi fyri, at børn ikki skilja avgerðir og rættindi, sum ávirka teirra gerandisdag, og at rætturin til kunning tí ikki verður veruligur.

TILMÆLI

Grundað á greiningina av hoyringarsvarunum frá børnum og ungum verður hædd tikið fyri hesum tilmælum í sambandi við arbeiðnum við barnalógini frameftir.

RÆTTSTUNDIS HJÁLP

Mælt verður til at áseta greið krøv um svartíð og uppfylging, umframt at tryggja skipaða atgongd til trivnaðarráðgeva og netverkssamskipara. Harumframt verður víst á tørvin á at tryggja børnum ein fastan kontaktpersón í truplum málum, so tey hava ein álítandi vaksnan at venda sær til.

RØDD OG VERULIGA ÁVIRKAN

Mælt verður til at seta greiðar mannagongdir fyri hoyring av børnum, eisini yngri børnum. Tað verður somuleiðis mælt til at skipa barnahoyringar í politiskum arbeiði, styrkja leiklutin hjá næmingaráðum og ungdómsráðum sum virknir partar í fólkaræðinum, og seta krav um afturboðan til børn, so tey verða kunnað um, hvat verður gjørt við teirra sjónarmið.

JAVNBJÓÐIS MØGULEIKAR

Mælt verður til at seta málrættaðar og fyribyrgjandi skipanir inn fyri børn í viðbreknum bólkum. Harumframt verður mælt til at seta krøv um mál- og tulkatænastur, so børn við øðrum móðurmáli ella serligum tørvi fáa somu atgongd til kunning og stuðul sum onnur børn.

SAMSTARV OG ÁBYRGD

Mælt verður til at gera heimildir og ábyrgdarbýti millum stovnar greiðari. Eisini verður mælt til at seta krøv um umboð og fastar mannagongdir í sambandi við tørvsmeting, so tað altíð er greitt, hvør hevur ábyrgd, tá fleiri aktørar eru partar av einum máli.

BARNAVINARLIGA KUNNING

Mælt verður til at seta krøv um, at børn skulu fáa kunning, sum er barnavinarlig, aldurshóskandi og visuell, og sum verður givin á einum máli, tey skilja. Hetta verður mett sum ein fortreyt fyri, at børn veruliga kunnu skilja síni rættindi og luttaka í málum, sum viðvíkja teimum sjálvum.

AT ENDA

Hoyringarsvarini vísa, at flestu børn og ung skilja endamálið við barnalógini og taka undir við henni. Lógin verður mett sum eitt týðandi og neyðugt stig fyri at styrkja rættindi, trivnað og vernd hjá børnum í Føroyum.

Samstundis vísa hoyringarsvarini á, at børnini sakna ítøkiligar lýsingar av, hvussu lógin skal virka í verki.

Tey seta spurning við, um tey vaksnu megna at seta lógina í verk á ein skipaðan og samanhangandi hátt.

Serliga ivast tey í, um tey vaksu duga at samstarva, um tey kenna lógina nóg væl til at fylgja henni, og um neyðugu førleikarnir, fakliga vitanin og ressursirnar eru til staðar.

Børnini vísa á, at um endamálið við barnalógini skal røkkast, so er avgerandi, hvussu tilgongdin verður skipað at seta hana í verk.